# Tíðin er komin at rætta kósina!

NÝGGÁRSGREIN
*Jenis av Rana v. Miðflokkin*



… tá knappliga 3000 í septembur doyðu í terroratsókn í New York, dugdu vit illa at skilja aftanfyriliggjandi óndskapin og vit øtaðust. Men samstundis verður hildið náttúrligt, at myndugleikanir, í hesum sama landi, hvønn dag loyva at sama tal av ósekum børnum verða drigin úr móðurlívi og dripin-( tal teirra, sum her hjá okkum verða frádømd rættin at liva, er umleið 50 árliga).

… tá ein av av AL Quaida terrorbólkunum fremur atsókn, meta flestu rætt verða at USA svarar aftur og nærum oyðir eitt av tilhaldslondum teirra- Afganistan. Men tá ein annar av terrorbólkum AL Quaida ( islamiskt jihad) fremur dagligu atsóknir sínar móti Ísrael, tá leikar alheims humanisman í móti Ísrael, sum í sjálvverju verjir seg.

… í Svøríki steina mótmælisfólk í sambandi við altjóða fíggjarfund, og dómar upp til hálvt ár verða feldir. Men tá børn í Miðeystri samstundis verða lokkaði at blaka grót móti ísraelum, og hesir verja seg, tá øsir alheims humanisman upp mótmælir móti Ísrael, einasta folkaræðisstýrda landinum í økinum, meðan drápsdiktaturlondini sleppa at hóreiggja sær sum tey vilja.

… her heima práta vit um oljuna, sum um hon er einasta vón og álit okkara, alt meðan Gud letur fiskiríkidømi streyma og floyma yvir okkum, so sjálvt samfelagsfrøðingar tosa um undur.

… meðan føroyaska landsstýrið setir heimsmet í pírni hvat neyðhjálp viðvíkur, sendir sama stýrið 367 mió. kr sum gávu til eina av heimsins ríkastu tjóðum, alt meðan fleiri og fleiri kenna sviðan av manglandi raðfestingum av ríkidømi samfelagsins.

… og vit kundu hildi á at víst á dømir frá farandi ári, sum klárt vísa at eitthvørt er, ið treingir til justeran í hugsanum okkara!

**Rættvísi og raðfesting.**

Tíðin er komin, tá rættur og raðfesting mugu broytast frá at vera tóm orð til verk, verk, hvørs úrslit mugu síggjast aftur í øllum samfelagsligum avgerðum, ið tiknar verða.

Eg droymi um tann dagin, tá rætturin til lívið, sum vit øll njóta ágóðan av, verður fyri øll- eisini tey óføddu, hvørs foreldur/ mammur líða undir byrðum og trupulleikum, sum tey ikki megna at bera einsamøll. Og tann dagurin má ikki verða fjart burtur, tá raðfest verður eftir tí fyrimynd, vit lesa um í Skriftini, m.a í Esajasar bók kap. 58, har skrivað verður um at: geva tí svanga, hýsa tí heimleysa og klæða hin nakna. Eitt ríkidømi, sum ikki fellur øllum íbúgvum samfelagsins í lut, hevur ikki uppiborið at verða kallað ríkidømi, men boðar frá ringastu armóðina, ið hugsast kann.

Farnu árini geva varhugan av, at alt fleiri eru, ið síggja hesi grundleggjandi samfelagsligu brekini, men politiskt hava tey higartil megna ov lítið. Hesum mugu vit læra av, og tí verður komandi løgtingsvalið ein hornasteinur fyri øll tey, ið ynskja eitt samfelag har rættur og rættvísi ræður. Alheimsins viðurskifti megna lítlu Føroyar lítið at broyta, men vit kunnu skapa eitt mini- samfelag, ið kann gerast ein fyrimynd fyri allar tær tjóðir, ið lítið virða tey virði, ið vit á okkara leiðum vita eru tey røttu.

Higartil hevur Harrin Gud okkara ríkiliga víst sítt ynski um at vælsigna okkum og lyfti Hansara er ævigt galdandi um at Signa tey, sum líta á Hann. Tað lyftið er ævigt galdandi, og tí fara vit trygg inn í komandi árið og vóna at 2002 verður árið, har tað at spyrja Harran verður at eyðkenna okkum øll- sum einstaklingar, sum familjur og sum samfelag.

# Árið 2001 gjørdist eitt sera hendingaríkt ár



NÝGGJÁRSGREIN
*Lisbeth L. Petersen, form. Sambandsfloksins*

Stóra ávirkanin av teim tíðindum, vit frættu uttan úr heimi, var fyri mong av okkum við til at skapa eina heimsmynd, ið var merkt av náttúruvanlukkum, ófriði, ræðumyndum vegna krígsstøðu og yvirgangsvirksemi.

Hin 11 september 2001 fer altíð at standa í minninum sum dagurin, har tað hendi, sum ikki kundi henda, tí tað heilt einfalt var ómøguligt og tyktist óveruligt.

Og kortini hendi tað !

Tíbetur eru vit í Føroyum sloppin undan ræðuleikum, sum hava hótt heimsfriðin, men føroyingar hava eins og onnur verið úti fyri hendingum og sorg í árinum, sum merkja ein fyri alt lívið, og sum ongantíð ber til at gloyma. Tá er gott at eiga góð minnir, og við tíðini eiga tey at standa eftir sum varðar.

Soleiðis er lívið, og soleiðis fer lívið altíð at verða.

**Ein broytingartíð**

Vit liva í eini tíð við broytingum, og í nútíðarsamfelagnum gongur skjótt, ja ofta so skjótt, at vit ikki fáa stundir at fylgja við, og sostatt heldur ikki stundir til at gera okkara ávirkan galdandi.

Fyri føroyingar hevur framtíð Føroya og broytingar í tí sambandi verið ein sera viðkomandi spurningur seinastu árini, og ikki minst í árinum 2001 hevur politiska gongdin hevur verið merkt av hesum.

Fyri Sambandsflokkin kann eg floksins vegna bert fegnast um, at árið hepnaðist so væl, og at vit gjørdist størstu flokkur hin 20 november. Tað eru vit sera takksom fyri.

Veljarin og ein meiriluti av Føroya fólki segði greitt, hvat hann helt um førda politikkin, og hvat hann heldur vildi hava

Seinasta árið hjá hesi landsstýrissamgongu er skjótt komið at enda, og skuldu skreytir gerast á fullveldiskósini, sum stungin var út í kortið, so skuldu tær verið gjørdar nú. Men ósemjur fyri opnum teppi hava ávirkað gongdina soleiðis, at teir størstu trupulleikarnir liggja eftir og bíða til komandi ár, tá fylgjurnar av fullveldissamtyktunum fara at vísa seg og rættiliga merkjast.

Árið 2002 fer at bera stórar avbjóðingar í sær, har komandi løgtingsmeiriluti og landsstýri skulu virka og berjast fyri at bjarga føroyska vælferðarsamfelagnum, ið hevur ávirkan á lívið og gerandisdagin hjá øllum føroyingum.

Tí verður árið 2002 eitt serligt og og eitt sera týdningarmikið ár.

At enda vil eg ynskja øllum føroyingum gott nýggjár og Harrans signing í komandi ári !

# Betri stev ynskist

**Tað hevur stóran týdning at stevið millum handverkarar og meistarar verður betur í nýggja árinum**

NÝGGJÁRSGREIN
*Poul Øregaard formaður í Føroya Handverkarafelag*

Sáttmálin ímillum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag gekk út í oktobur 2001, vit valdu at samráðast saman við Landsfelag Handverkaranna, tað gekk sera trupult at samráðast.

Semingsmenn komu uppí, og semja varð undirskrivað.

Tá ið lønartalva skuldi skrivast, vildi Føroya Handverksmeistarafelag ikki góðtaka lønarhækkingina fyri allar lønarbólkar, ið standa í sáttmálanum. Ein nevnd er sett sambart grein 36 í sáttmálanum til at loysa málið.

Tað, ið hevur stóran týdning fyri okkum er, at hesi viðurskifti koma uppá pláss, og at stevið ímillum okkum og Føroya Handverksmeistarafelag verður betur í komandi ári. Tað vísir seg at vera sera óheppið, at sami persónur er formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag.



# Skála og Runavík tikið eitt stórt stig

**Í 2001 tóku Skála og Runavíkar Kommunur eitt sera stórt og tíðandi stig sum kemur at styrka hesar kommunur og helst allan fjørðin. At kommunurnar leggja saman skal koma tí vanliga borgarnum til góðar eitt nú við fleiri og betri tænastum**

NÝGGJÁRSGREIN
*Rodmund Nielsen, býráðsformaður*



Fyrst í februar í 2001 tóku oljufeløgini avgerð um at Runavík skuldi verða útgerðarhavn.

Vinnulívið og feløg í Eysturoynni skipaði seg fyri nøkrum árum síðani í felagið Atlantic Supply Base, ASB hettar fyri at standa saman um hesa nýggja vinnu og ikki kann sigast annað enn at tað hepnaðist.

Runavík hevur í 2001 verið útgerðarhavn og hava oljufeløgini verið væl nøgd við tær tænastur tey hava fingið í Runavík. Hettar fyrsta árið hevur verið sera spennandi og mennandi fyri vinnuna í Eysturoynni og sum so fyri allar Føroyar.

Tað at gera seg til reiðar at taka ímóti eini slíkari nýggjari vinnu er krevjandi. Tað krevur nógvar fyrireikingar og hava fyritøkurnar klára seg sera væl og eiga hesar fyritøkur stórt rós uppiborið.

Tað at fyritøkur taka seg í feløg fyri at brynja seg til stórar avbjóðingar í komandi tíð er av sera stórum tíðningi, her er neyðugt at draga eina og somu línu skal land og fólk fáa so nógv sum møguligt burtur úr hesi nýggju vinnu. Frá kommunalari síðu verður fyrireika seg til komandi árini so at karmarnir hjá verandi og komandi vinnu verða so góðir sum møguligt. Hevur vinnan góðar karmar vita øll, at so hevur samfelag okkara tað eisini gott.

Í 2001 tóku Skála og Runavíkar Kommunur eitt sera stórt og tíðandi stig sum kemur at styrka hesar kommunur og helst allan fjørðin.

At kommunurnar leggja saman skal koma tí vanliga borgarnum til góðar eitt nú við fleiri og betri tænastum.

Hesar kommunur eru ikki ólíkar, báðar kommunurnar er væl útbygdar og hava tær eisini tað til felags at tær hava eitt sunt vinnulív sum fevnur um flest allar vinnugreinar.

Tað at kommmunalu eindirnar verða størri kemur helst tey komandi árini av sær sjálvum. Eitt av endamálinum við eini samanlegging er at at menna økini so at menning og trivnaður verður í øllum pørtum av landi okkara.

Kommunurnar báðar skrivaðu undir sáttmála um samanlegging í september í 2001 hesin sáttmáli fær endaligt gildi í 2005 tá ið eitt felags valt býráð kemur at hava ábyrdina av samanløgdu kommununi.

Kommunurnar Skála og Runavík fara frá 2002 at arbeiða sera tætt saman, á teimum ymiskum økjum at byrja við serliga á tí tekniskaøkinum eitt nú við at gerða nýggjar verkætlanir.

Tøkk fyri árið 2001 serliga til borgararnar á Skála og Runavík fyri dyggan stuðul í sambandi við samanleggingina av kommununum við ynskið um eitt gott nýggjár.

# Rekjumarknaðurin

**Prísstøðið á rekjum er komið so langt niður, at raksturin hjá føroysku rekjutrolarnum hongur ikki saman, og sum útlitini eru, fær hesin fjarflotin trupulleikar við at koma ígjøgnum hesi ringu ár, og kann tað verða ov leingi at biða eftir betri tíðum**

NÝGGJÁRSGREIN
*Hans Johnnes á Brúgv, stjóri á Føroya Fiskasølu*

Føroya Fiskasølan arbeiðir á nógvum marknaðum og eisini við nógvum fiskasløgum. Marknaðurin fyri rekjur hevur verið javnt viknandi ígjøgnum fleiri tey seinastu árini. Føroyski rækjuflotin hevur havt tað tungt í fleiri ár og hetta árið, sum er farið, var uppaftur verri. Nøgdin sum føroysku skipini hava fiskað er á leið tann sama sum undanfarin ár, men prísstøðið er bara fallið og fellur framvegis. Vanliga verður rekjan býtt sundur í ídnaðarrekjur (sekkjarekjur), kókaðar rekjur og Japanrekjur.

**Ídnaðar-rekjur**

Prísstøðið á ídnaðarrekjum var komið heilt niður á botn í summar, men hevur hækka fleiri krónur í heyst, soleiðis at prísstøði ídag er uml. 10,00 kr/kg. Ein av orsøkunum til at prísstøðið hækkaði í heyst var, at í juli góvust Kanadiumenn at fiska rækjur (inshore) eitt sokallað verkfall um prís, tí tað lønti seg ikki at fiska rekjur. At kanadiu menn steðgaðu og eisini at norsk og íslends rekjuskip fóru at fiska annað fiskaslag, førdi við sær at útboðið av ídnaðarrækjum minkaði munandi.

Sjálvt um prísstøðið er hækkað fyri ídnaðarrekjur, so eru útlitini vánalig. Orsakað av at marknaðurin fyri kókaðar rekjur er sera vánaligur, framleiða skipini størri nøgdir av ídnaðarrekjum enn vanligt. Úrslitið av hesum verður at útboðið av ídnaðar rekjum veksur og tryst kemur á prísin á ídnaðarrekjum í 2002.



**Kókaðar rekjur**

Marknaðurin fyri kókaðar rækjur er sera vánaligur, og prísstøðið seinasta ári er fallið við 25-30% og fellur enn. Hesar rekjur verða vanliga seldar í Europa og Fjareysturi. Ein av orsøkunum til prísfallið er, at alingin av kineskum rekjum er komin fyri seg, aftaná at at hava havt trupuleikar við sjúku, og væntandi koma uml. 100.000 tons meiri av aldum rekjum inn á marknaðinum í Kina, enn undanfarin ár. Marknaðurin í Kina, sum keypir uml 35.000 tons av kókaðum kaltvatns rekjum árliga, hevur stórt sæð ligið í eini bíðistøðu fram til dagin í dag. Hetta førir við sær at goymslurar í europa og canada hópa seg upp og at trysti á prísin verður øðiligt.

Prísstøðið sera er lágt, og sum útlitini eru í Kina í dag, fer prísurin neyvan at hækkað. Stutt kann nevnast at í dag fáa skipini uml 8 kr/kg minni fyri stórar kókaðar rekjur, enn tey fingu fyri somu rekjur fyri bert einum ári síðan.

**Japan rekjur**

Tær av Føroyingum so væl kendu “Japan Rekjurnar” sum í sínari tíð vóru “gull” verdar eru eisini falnar niður í eitt sera lágt prísstøði. Orsøkin til lágu prísirnar á “Japan rækjum” er vánaligi búðskapurin í Japan og kappingin við rekjurnar sum russar fiska í Okhotskahavinum, ið verða seldar bíliga til Japan. Prísirnir fyri “Japan rekjur”eru lækkaðir sera nógv. Sammeta vit prísirnar í fjør og í ár, so er prísmunurin uml. Kr. 23,- minni fyri kilo fyri støddina 50/70 í ár.

Prísstøðið á rekjum er komið so langt niður, at raksturin hjá Føroysku rekjutrolarnum hongur ikki saman og sum útlitini eru, fær hesin fjarflotin trupulleikar við at koma ígjøgnum hesi ringu ár og kann tað verða ov leingi at biða eftir betri tíðum.